# Ferguson minnist enn Toftir

Skotski landsliðsskiparin, Barry Ferguson, hevur avgjørt ikki góð minni um seinastu ferð sína til Svangaskarð. Ta ferðin vóru skotar hepnir at sleppa heim við 2-2 javnleik. - Tað var ein av ringastu døgunum í míni tíð sum spælari. Fólk vænta, at tú skalt vinna trygt, men tað megnaðu vit ikki. Tað var ein smalur vøllur, har undirlendið ikki var av tí besta, men serliga í fyrra hálvleiki spældu vit undir alt lágmark. Og vit eru sannførdir um, at talan ikki skal verða um endurøku hesaferð, sigur Barry Ferguson við TeamTalk.



# Súni heldur fram í AaB

Súni Olsen longdi fríggjadagin sáttmálan við felag sítt AaB. Talan er um ein eittára sáttmála. Tað váttar Jákup í Stórustovu, sum er umboðsmaður hjá Súna Olsen. Formaðurin í GÍ, Andreas Poulsen, segði fríggjadagin , at tað hevði stóran týdning fyri seg, at hetta greitt undan dystinum leygardagin. – Vit eru errin av, at ein spælari hjá okkum stendur seg somikið væl. Og vit løgdu nógv fyri, soleiðis at Súni einans hevði landsdystin at hugsa um, tá spælararnir fyrireikaðu seg til dystin móti heimsmeistarunum, segði GÍ-formaðurin

## Lyngby næstan í superliguni

**Full úrtøka til eitt annað av botnliðnum hevur í dag lagt størri trýst á Fremad Amager í botninum**

DANMARK 1. DEILD
*Jákup Mørk*

Christian Lamhauge Holst og Atli Danielsen hvíla seg í dag saman við øllum hinum, sum framdu dyggiligt avrik á Tórsvølli leygarkvøldið.

Liðfelagarnirhjáteimum báðum hava í dag spælt. Oddaliðið Lyngby vitjaði tíðliga seinnapartin Frem í Valby.

Seinastu tíðina hevur tað gingið væl hjá Frem, men í dag megnaðu teir einki at gera við Lyngby. 2.474 vóru eygnavitni, tá ið felagið hjá Christian Lamhauge Holst vann 3-0. Kim Aabech skoraði í 5. og 42. minutti, og Tobias Mikkelsen í 61. minutti. Tað resta trý umfør, og Lyngby er átta stig frammanfyri AGF og Fredericia. Harvið hevur Lyngby meiri enn annað beinið í superliguni.

Sigurin í dag var serliga kærkomin. Lyngby hevur tvær tær seinastu ferðirnar spælt javnt. Tað hevur borið við sær tos um, at teir í Lyngby høvdu fingið gummibein, nú uppflytingin til superliguna var so nær við. Í botninum varð meiri trýst lagt á Fremad Amager, sum tó ikki skal í eldin í dag. Brabrand, sum var aftast av øllum, vann 1-0 á Aarhus Fremad, sum eisini er í vanda at flyta niður. AB og Fremad Amager hava spælt 26 dystir, og hini hava spælt 27 dystir. Dysturin hjá Fremad Amager varð útsettur, tí tveir av spælarunum vóru burtur í landsliðsørindum. Teir eru Andrew av Fløtum, sum var í Føroyum, og Jónas Tór Næs, sum var við U21-landsliðnum.

# Var púrasta róligur

**Hóast tað kókaði millum tey 6.000 á Tórsvølli seinasta korterið, so helt landsliðsvenjarin sjálvur, at hann sjáldan hevur verið so róligur, sum hann var tað hesaferð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Ein tann besti dysturin, sum eg nakran tíð havi verið við til á føroyska landsliðnum. Tað var greiða skoðsmálið, sum Jógvan Martin Olsen hevði leygarkvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sjáldan man ein føroyskur landsliðsvenjari hava verið meira nøgdur, enn Jógvan Martin Olsen var leygarkvøldið. Gaman í gjørdist talan enn eina ferð um eitt av teimum tepru tapunum. Men verður hugsað um tungu byrjanina, sum landsliðið hevur havt undir leiðsluni hjá Jógvani Martin, og um móttøðuna, sum hesa ferð var tann sterkast møguliga, so var 1-2 á heimavølli væl og virðliga til at liva við.

Sjálvt ikki, tá Rógvi Jacobsen eitt lítið korter fyri leik lok stútaði bóltin í kassan, fór pulsurin hjá Jógvani Martin í topp.

- Eg haldi ongan tíð, at eg havi verið somikið róligur upp til ein dyst, sum eg var tað hesaferð. Eftir at vit høvdu etið døgurða í dag slappaðu vit av, og eg nevndi nevnliga fyri John, at eg helt, at pulsurin fór niður um tey 40.

- Eg visti, at allir menn vóru tendraðir og konsentreraðir. Á taktik-fundinum nýttist orðið bara at vera hálvtalað, so lurtaðu allir, og tá kennir tú týðiliga, at hetta verður ein góður dagur.

### Eitt tað besta nakrantíð

Um sjálvan dystin var Jógvan Martin eisini væl nøgdur. Bæði viðvíkjandi upplegginum. Mátanum sum spælararnir útintu hetta. Og so sjálvum leikliga avrikinum á vøllinum.

- Eg var serstakliga fegin um, at avgerð okkara um at nýta Christian Høgna í vinstra borði hepnaðist somikið væl. Og so eisini, at spælararnir tordu at taka tann einastandandi møguleika, sum tað er, tá tú spælir á heimavølli móti heimsmeistarum. Og yvir høvur vóru allar fyrireikingar júst so, sum tær skuldu vera. Og eg vil gjarna rósa øllum stabinum kring landsliðið fyri tað arbeiðið, sum teir hava gjørt.

Um tú skalt taka saman um tíðina, sum tú hevur verið á landsliðnum. Hvar liggur hesin dysturin so?

- Eg havi verið í føroyskum landsliðshøpi í eini 10-11 ár nú. Og eg haldi avgjørt, at avrikið í dag er eitt tað besta, sum eg nakran tíð havi upplivað. Eg haldi ikki, at eg havi sæð føroyska landsliðið nakran tíð hevur spælt betri fótbólt. Fyrsta korterið eruu vit kanska ikki nóg vaknir í verjupartinum, og seinna málið er kanska dekan ov lætt. Men vit spæla okkum væl uppaftur.

Um tú skalt velja ein spælara, sum skaraði framúr. Hvør skal hesin so verða?

- Allir!

# Komu undan skotriðunum á Balkan

**Venjararnir siga seg vera væl nøgdar við føroyska avrikið í fyrsta U-21 undankappingardystinum nakrantíð, sum Føroyar hava verið partur í**

FÓTBOLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Løtan stóð í skugganum av, at heimsmeistararnir vitjaðu í Føroyum. Men tað eigur ikki at fara aftur við borðinum, at nýtt blað í føroyskari fótbóltssøgu varð skrivað leygarkvøldið, tá ið Føroyar fyri fyrstu ferð nakrantíð vóru partur av U-21 undankappingardysti.

Heðin Askham, Bill Jacobsen og teirra ungu menn vóru 75 kilometrar uttanfyri Sarajevo, har føroyska liðið, sum var mannað við nógvum spælarum úr Formula deildini, tapti 2-0 ímóti Kroatia.

Málini vóru skorað í 23. minutti og í yvirtíðini. Í fyrra førinum var Rukavina leysur á brotsteigarmarkinum, og í seinna førinum var innskifti Ivan Begovic fyrstur á innleggi úr høgru.

Føroyska ferðalagið, sum nú er komið til Albania, har dystur verður mikukvøldið, er ikki fallið í fátt. Teir siga seg vera nøgdar við avrikið og úrslitið í Kroatia.

- Á okkara liði vóru tveir spælarar úr næstbestu deildini í Danmark, og teir flestu av hinum hava royndir úr Formula deildini. Felags fyri teir allar er, at teir hava spælt á yngru landsliðunum. Tí vita teir, hvat tað snýr seg um, sigur Bill Jacobsen av Balkan, og hann heldur fram:

- Útgangsstøðið hjá okkum var at hava nógv fólk aftanfyri bóltin. Levi Hanssen var bindilið millum verjuketuna og miðvøllin. Har var hann, inntil hann orsaka av skaða ikki kom á vøllin eftir steðgin. Tá var Kristoffur Jacobsen, sum hevði verið einsamallur í álopinum, settur í hetta plássið, meðan Magnus Olsen varð settur inn í álopið. Tá ið Pætur Jørgensen fór av vøllinum, fór Magnus á miðvallarplássið í høgru, og tá kom Tummas Hans Rubeksen inn í álopið.

*Hvussu var dystargongdin?*

- Ferðin var støðugt høg. Okkara setningur var at byrgja upp fyri eyðkenda Balkan smáspælinum og skjótu flytingunum. Vit vóru væl skipaðir, og tað eydnaðist væl at spæla nógv og sparka lítið, tá ið vit fingu fatur á bóltinum. Teir høvdu einar seks góðar royndir ímóti okkara máli, og tað mugu vit rokna við.

Høvdu okkara nakrar royndir?

- Kristoffur Jacobsen varð spældur inn um verjuna í 37. minutti. Skotið varð parerað til horna, og í tí støðuni stóð Einar Hansen, ið annars var sera drúgvur, væl fyri, men einki spurdist burturúr. Gamla søgan er framvegis galdandi, altso at tað knípir á síðsta triðinginum. Vit eru ikki nóg stinnir í umstillingsspælinum, sigur Bill Jacobsen.

Saman við Kroatia og Føroyum eru Albania og Italia í bólkinum. Fríggjakvøldið vann Italia 4-0 á heimavølli ímóti Kroatia. Mikukvøldið skulu Føroyar spæla í Tirana í Albania.

## Fakta um dystin

**Kroatia-Føroyar 2-0**
**U-21 EM undankappingardystur**
**Á NK Varteks stadion í Varazdin í Kroatia leygardagin 2. juni 2007 kl. 16.30**
1-0: Ante Rukavina 23.
2-0: Ivan Begovic 90.
**Dómarabólkur av Malta:** Anthony Zammit, Joseph Camilleri, Mariano Debono og Chris Lautier
**3000 áskoðarar**
**Kroatia:** 1. Filip Loncaric – 2. Domagoj Vida, 5. Kristijan Ipsa, liðformaður, 6. Josip Mizic (Dejan Louren, 8.), 3. Denis Glavina – 8. Ivo Ilicevic, 10. Miljenki Bosnjak (16. Ivan Begovic, 46.), 11. Drago Gabric (18. Davor Kukec, 62.), 4. Marko Dinjar – 7. Ante Rukavina, 9. Tomislav Busic
**Gult kort:** Domagoj Vida
**Føroyar:** 1. Gunnar Nielsen, liðformaður – 2. Jónas Þór Næs, 4. Jóhan Troest Davidsen, 5. Poul Thomas Dam, 3. Einar Hansen – 15. Pætur Jørgensen (18.Tummas Hans Rubeksen, 66.), 8. Bogi Løkin, 6. Levi Hanssen (14. Magnus Olsen, 46.), 9. Emil Nolsøe Leifsson, 7. Jóhan V. Gunnarsson (12. Fritleif í Lambanum, 88.) – 17. Kristoffur Jacobsen
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 16. Símun Rógvi Hansen, 10. Sølvi Vatnhamar, 11. Jón Krosslá Poulsen, 13. Sigmund Jacobsen.
**Gult kort:** Jónas Þór Næs